# Nýggjur flogvøllur

HANS PAULI J. HENTZE

Síðstu tíðina hevur evnið flogvøllur verið nógv frammi í fjølmiðlunum. Millum tað, sum hevur verið nevnt, soleiðis sum eg havi skilt tað, er at modernisera og effektivisera flogvøllin vesturi í Vágunum. Einki galið í tí soleiðis sæð. Somuleiðis hevur verið nevnt um at byggja ein meira nútíðarhóskandi flogvøll. Glyvursnes og Søltuvík hava verið nevnd, og í farnu viku var Nólsoyggin somuleiðis nevnd sum eitt møguligt alternativ til ein nýggjan flogvøll.

Í vikuskiftissosialinum, dagfestur 5. 10. 2007, las eg grein um hetta evnið, skrivað av Andreasi Petersen, har hann nevnir, at Glyvursnes er einasta rætta stað her í Føroyum til at hava ein flogvøll. Hetta er, eftir míni meting, burturvið, at hetta verður sagt. Ikki tað, Havnin jú størsta bústaðarøkið í ladninum, so at soleiðis sæð skilji eg væl hugskotið at hava flogvøllin í høvuðstaðarøkinum. Men so kunnu vit eisini venda steikina og siga, at Tórshavn er IKKI alt, hóast tað eru fólk í Havnini, sum ikki taka undir við hesum.

Sum nevnt omanfyri, at fara út í bløðini og siga, at ein nýggjur flogvøllur skal byggjast úti í Glyvursnesi, og tað undir øllum umstøðum, er burturvið. Andreas hevur eftir øllum at døma gloymt at hugsa um, at mjørki kann koma, og veðrið í Føroyum er til tíðir heilt svikaligt. Nú er Havnin eitt sera deiligt mjørkapláss, og ávísar ættir eru tiltiknar ringar í Suðurstreymi.

Eftir míni meting, so eru aðrir møguleikar til staðar at hava ein nútíðarhóskandi flogvøll eina aðra staðni í hesum lítla oyggjalandi. At siga hvar er ikki mín uppgáva, at taka ta avgerðina lati eg teir serkønu at avgera. At ikki hava flogvøllin uttan fyri Havnina er eingin katastrofa. Taka vit t.d. og siga, at flogvøllurin verður bygdur í Søltuvík, so koma bygdirnar á Sandoynni at fáa fleiri størv. Somuleiðis vita vit, at fleiri fólk vilja flyta suður at búgva. Í hesum sambandi kann nevnast, at Sandoyartunnilin hevur verið eitt heitt evnið í miðlunum, og verður hann veruleiki, so er tann enn skjótari at koma suður, eisini hjá teimum, sum koma at hava starv á flogvøllinum, men sum ikki hava ætlanir at flyta suður.

Men sjálvandi, alt skal bara til Havnar, tí tað, sum Havnin ikki hevur, skal Havnin undir øllum umstøðum bara hava. Og tað óansæð prís.

At enda kann sigast, at tað bilar einki, at koyrt verður nakrar minuttir eyka, tí so stórt er hetta land heldur ikki, og hóast at høvuðstaðir kring Evropa hava flogvøll so at siga beint við, so skal ein undir øllum umstøðum, um koyrt verður við bili, koyra kanska upp til ein tíma, áðrenn viðkomandi er komin til rætta staðið. So hví grenja um nakar minuttir og kanska eisini um peningarupphæddir í ymsum máti.

# Ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur

HELGI ABRAHAMSEN



Í eini blaðgrein, sum stóð í Dimmalætting seinasta týsdag, gramdi Høgni Hoydal seg um, at kollektiva minnið í Føroyum er sera stutt, og tí ber til hjá politikarum at siga hvat sum helst í fjølmiðlunum, uttan at tað verður eftirkannað ella hildið upp ímóti veruleikanum.

Hetta kann ikki sigast at vera nøkur óvanlig byrjan til eina blaðgrein hjá Høgna Hoydal, og tað er heldur ikki serliga óvanligt, tá hann í næsta setningi sigur, at hetta sum hann nevnir, serliga er galdandi fyri politikarar úr øðrum flokkum enn hansara egna. Og so endar alt sum tað plagar, við at Høgni leggur sína egnu søgu fram (eina av tí slagnum, sum so avgjørt átti at verið bæði eftirkannað og hildin upp ímóti veruleikanum).

**Var tað eitt bragd?**

Høgni hevur útbúgving í samskifti, og hevur tí lært at brúka positiv orð um sínar egnu gerðir, og negativ orð um tað sum hini standa fyri. Hetta kemur týðuliga til sjóndar í greinini. Millum annað fær hann tað at ljóða sum eitt búskaparligt bragd, at undanfarna landsstýri hevur tveitt meira enn tvær milliardir í blokkstuðli út av vindeyganum, tí, sum hann sigur, høvdu teir ikki gjørt tað, so høvdu vit havt endurtikið 80'ini á tamb – uha, uha!

So var tað kanska eisini gott, at alifiskurin bleiv smittaður við ILA, tí hvat kundu pengarnir ikki verið brúktir til? - Vorðið sum búskaparpolitikkur !

**Mugu hava inntøkur**

Er tað nakað, sum føroyski búskapurin hevur brúk fyri, so eru tað tryggar inntøkur. At tveita verandi inntøkur burtur, er eingin kunstur, og fara politikarar haraftur-at at ávara ímóti inntøkum, tí vandi er fyri, at vit ikki duga at eiga pengar, so er lítið gott í væntu.

**Stóðu ikki á egnum beinum**

Høgni sigur, at talan hjá undanfarna landsstýri var um at taka meira enn 360 mió. krónur úr búskapinum, at stýra ábyrgdarfult og standa á egnum beinum. Hann sigur alt hatta í einum setningi, fyri at lesarin ikki skal varnast, hvussu lítið høpi er í tí, sum sagt verður.

Jú rætt er tað, at meira enn 360 mió. krónur vórðu tiknar úr búskapinum (um árið). Men at teir stýrdu ábyrgdarfult og stóðu á egnum beinum, hevur einki við veruleikan at gera. Teir høvdu eitt samlað undirskot á næstan 2,5 milliardir krónur í 6 ár, og hetta undirskotið bleiv fíggjað við blokkstuðli úr Danmark. Kalla tað so "at standa á egnum beinum".

**Vilja skerja meira**

Nú hava teir forkomið einum parti av hesum møguleikanum, og sambært Degi og Viku fríggjakvøldið, hevur Høgni longu boðað fólkatinginum frá, at hann ætlar at strika restina av blokkstuðlinum í komandi valskeiði, meðan Karsten Hansen (í einum øðrum innslagi í somu Degi og Viku) gekk og leitaði eftir uppsparingini í Landsbankanum. Hann skilir ikki, hví so fáir pengar eru eftir har. – Nei hvar munnu pengarnir vera farnir? Hvussu ber tað til, at tá 2 milliardir verða tveittar burtur, so er minni eftir at spara upp?

Er tað kanska tann ábyrgdarfulli búskaparpolitikkurin (á egnum beinum), sum er farin at vísa seg í verki?

# Demokratia og framtíðin

BJARNI DJURHOLM
landsstýrismaður



Í næstum fer Demokratia at handa undirritaða frágreiðing um, hvussu vit kunnu økja um leiklutin hjá kvinnum í politiskum avgerðum.

Nevndin varð ultimo 2005 sett av Hans Paula Støm, landsstýrismanni, sum tá umsat javnstøðumál. Í 2006 var málsræðið flutt til undirritaða.

Í Demokratia eru 10 limir, mannað við umboðum úr politisku flokkunum, Javnstøðunevndini, Kvinnufelagssamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag og KSF.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er soljóðandi:

"Nevndin skal skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum til tess at økja um leiklutin hjá kvinnum í politiskum avgerðum, so talið á kvinnum á løgtingi og í kommunustýrum økist, og umboðanin samsvarar á leið við umboðanina í hinum Norðurlondunum."

Í Føroyum eru ongar lógarásettar forðingar fyri javnstøðu. Kortini er ikki javnstøða millum kynini í politikki, í privatum, almennum størvum osfr. Henda støða er óivað hugburðstreytað.

Aðrastaðni verður dentur lagdur á, at meginumsitingin, kommunurnar og vinnan hava í huga javnstøðu í øllum viðurskiftum. Soleiðis eigur eisini at vera í Føroyum.

Tá Demokratia handar undirritaða frágreiðingina við hugskotum um, hvussu talið á kvinnum kann økjast á løgtingi og kommunustýrum, er fyrsti tátturin hjá nevndini lokin.

Í tí sambandi verða Demokratia og javnstøðunevndin kallað til fundar í Vinnumálaráðnum, har frágreiðing og niðurstøður verða viðgjørd.

Tá er eisini grundarlag at taka støðu til, um undirritaði skal heita á løgtingið um at lata Demokratia halda fram í t.d. eitt ár fyri at eftirmeta gongdina á løgtingavalinum komandi, at viðgera kommunuvalið o.s.fr. Higartil hevur Demokratia ikki heitt á undirritaða um, at nevdnin skal halda fram

Arbeiðið hjá Demokratia fer eisini at svara høvuðsspurninginum hjá ST í CEDAW-frágreiðingini, sum ljóðaði soleiðis: What temporary special measures, if any, are being contemplated in the Faroe Islands to increase the number of women in political and public life?

Tí verður í spenningi bíðað eftir frágreiðingini hjá Demokratia. Ein frágreiðing, sum óivað verður eitt kelduvað av uppskotum at taka støðu til og at fremja í verki.

Javnstøða er eisini eitt arbeiðsmarknaðarmál. Tí hevur undirritaði tikið stig til at manna eina kommissión, sum hevur sum endamál at lýsa týdningin av javnvágini millum privatlív/familjulív og arbeiðslív. Arbeiðið byrjar í næstum, og skal kommissiónin lata Vinnumálaráðnum frágreiðing og uppskot við ársenda 2008.

Samanumtikið fevna javnstøðuspurningarnir víða. Undirritaði leggur stóran dent á at tryggja, at javnstøða gerst ein sjálvsagdur partur í gerandisdegnum - politiskt, alment, privat og ikki minst á arbeiðsmarknaðinum.

# ALS konsolideráð - tíðin er nú komin at hækka útgjaldið hjá ALS

INGRID S. HENRIKSEN

limur í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag og fyrrverandi varalimur í stýrinum fyri ALS

Føroyska arbeiðsloysisskipanin varð sett í gildi í 1992, eftir at føroyska samfelagið hevði rent seg fast í djúpa og vídfevnda fíggjarliga kreppu. Longu í 1992 var arbeiðsloysið vorðið sera høgt og eginognin hjá nýstovnaðu føroysku arbeiðsloysisskipanini var lítil og ongin – einans 20 mió. kr. í byrjunarfæ frá landskassanum. Útgjaldsprosentið varð tískil sett til einans 70% av einari arbeiðaraløn – t.v.s. heili 20% lægri enn 90%-útgjaldsprosentið, ið var og enn er galdandi í donsku arbeiðsloysisskipanini.

Tásitandi kreppulandsstýri lovaði teimum arbeiðsleysu og fakfeløgunum á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum, at útgjaldið hjá ALS skuldi hækka til danskt støði, tá tíðirnar blivu betri og ALS skipanin hevði ment seg fíggjarliga.

Vert er at bíta merki í, at umboð fyri tásitandi politiska viljan – Marita Petersen, løgmaður, Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í almannamálum og Signar á Brúnni, landsstýrismaður vegna Tjóðveldisflokkin longu á fundi hin 9. mei 1994 millum fakfelagsumboð á almenna- og privata arbeiðsmarknaðinum umframt Felag Teirra Arbeiðstøku góvu til kennar, at útgjaldið hjá ALS kundi hækka til 90% av einari arbeiðaraløn, tá peningur bleiv tøkur. Í hesum sama høpi skal somuleiðis verða víst á, at fyrrverandi stýrisforkvinna fyri ALS, Karin Kjølbro, (frá 1996 til 2004) í sambandi við at arbeiðsloysisútgjaldið varð sett á dagsskrá í fjølmiðlunum fleiri ferðir legði dent á, at ALS mátti konsoliderast til uml. 500 mió. kr. áðrenn útgjaldið hjá ALS kundi hækka.

Síðan ALS varð sett á stovn í 1992 hava fakfeløgini á almenna- og privata arbeiðsmarknaðinum á fleiri fundum samtykt at heita á stýrið fyri ALS og politiska myndugleikan at hækka útgjaldið til 90% ella í minsta lagi 80% av einari arbeiðaraløn. Hesar áheitanirnar um hækkan av arbeiðsloysisútgjaldinum hava higartildags onki úrslit givið. Arbeiðsleys í Føroyum fáa framvegis eitt sera lágt útgjald – eitt útgjald sum framvegis bert er 70% av eini arbeiðaraløn - hetta sjálvt um føroyska arbeiðsloysisskipanin nú er fult konsolideráð og eginognin hjá arbeiðsloysisskipanini er vorðin sera høg.

Eginognin í ALS kom longu fyri 4 árum síðani uppá uml. 500 mió. kr. og var eginognin sambært rakstrarroknskapinum hjá ALS fyri árið 2006 knappar 550 mió. kr. Skipanin hevur sostatt nú ein eginpening uppá uml. 550 mió. kr. at standa ímóti við. Tíðin er sostatt komin at hækka útgjaldsprosentið til 90% av einari arbeiðaraløn, soleiðis sum politiski viljin meldaði út fyri skjótt nógvum árum síðani.

Núverandi politiski viljin - Javnaðarflokkurin og aðrir politiskir flokkar, ið siga seg vilja fremja veruliga vælferð fyri allar borgarar landsins – eisini fyri tey, ið eru ella gerast arbeiðsleys – eiga uttan meiri drál at signalera, at lága føroyska arbeiðsloysisútgjaldið beinanvegt eigur at hækka frá 70% til 90% av einari arbeiðaraløn.

Somuleiðis eigur politiski viljin/politiska skipanin at syrgja fyri, at lógin um ALS verður broytt soleiðis at eisini fiskimenn fáa møguleika at fáa útgjald frá ALS, tá teir gerast arbeiðsleysir.